TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

**Pkt. Tekstur** **Síða**

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | | 2 |
| 1 | Val av býráðsnevndum | 2 |
| 2 | Skattatøl í desember og restina av árinum | 5 |
| 3 | Dagføring av reglugerð fyri brúk av bátaplássum | 5 |
| 4 | Uppskot at broyta byggisamtykt í Froðba fyri økið til nýggjan kirkjugarð | 7 |
| 5 | Uppskot um bygging av tilbúgvingarstøð (Brandstøð) | 8 |



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-A00-17-17**

## 1. Val av býráðsnevndum

### Málsfrágreiðing

Valbólkurin við 4 býráðslimum ávíkavist Súsannu Bertholdsen, Bjarna Hammer, Boga Johannesen og Kristinu Roest hevur í tveimum umførum tann 21. desember 2017 og tann 8. januar 2018 heitt á borgarstjóran um at skipa nevndirnar av nýggjum, sí viðfestu skjøl í málinum.

Val av føstum limum og tiltakslimum í býráðsnevndunum á skránni. Tríggir valbólkar - A ( 4 býráðslimir) B (2 býráðslimir, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen) og C (borgarstjórin).

Kristin Michelsen, borgarstjóri, setti fundin kl. 17:00, har hann boðaði frá, at valbólkurin við omanfyri nevndu 4 býráðslimum ynskir at skipa nevndirnar av nýggjum. Valið av nevndunum fer fram sambært §§ 3 og 28 í kommunustýrislógini.

Spurdir av borgarstjóranum, upplýstu umboð fyri valbólkarnar, at tað ikki var neyðugt við lutakasti í føstu nevndunum, tó uttan í fíggjarnevndini, har lutakast varð.

Semja var í valbólkunum um tann háttin, ið lutakasti varð framt.

### Avgerð

**Í føstu nevndirnar vórðu vald:**

Fíggjarnevnd:

Borgarstjórin er føddur formaður. Valbólkur A valdi Kristinu Roest sum fyrstvalda lim í fíggjarnevndini. Í uppskoti til 3. valda limin eru Bjarni Hammer fyri valbólk A og Anita Vibergsdóttir fyri valbólk B.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Lutakast millum Bjarna Hammer og Anitu Vibergsdóttir. Lutakastið stóðu borgarstjórin og kommunustjórin fyri. Bjarni Hammer vann lutakastið soleiðis at fíggjarnevndin er samansett við hesum limum:

Kristin Michelsen, borgarstjóri er føddur formaður í fíggjarnevndini, Kristina Roest og Bjarni Hammer. Tiltakslimur fyri borgarstjóran er Anita Vibergsdóttir, tiltakslimur fyri Bjarna Hammer er Súsanna Bertholdsen og tiltakslimur fyri Kristinu Roest er Bogi Johannesen.

Vinnu- og havnanevndin:

Uppskot til limir úr valbólki A eru Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen, tiltakslimir fyri Boga er Bjarni Hammer og tiltakslimur fyri Súsannu er Kristina Roest. Uppskot til limir úr valbólki B er Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir er tiltakslimur. Soleiðis samtykt.

Mentanarnevnd:

Valbólkur A: uppskot til limir Bjarni Hammer og Súsanna Bertholdsen, tiltakslimir eru Kristina Roest fyri Bjarna og Bogi Johannesen fyri Súsonnu Bertholdsen. Uppskot frá valbólki B eru Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen er tiltakslimur. Soleiðis samtykt.

Trivnaðar- og umhvørvisnevnd:

Valbólkur A: Bjarni Hammer og Bogi Johannesen, tiltakslimur er Kristina Roest fyri Bjarna og Súsanna Bertholdsen er tiltakslimur fyri Boga Johannesen. Valbólkur B er Alvi Mortensen fastur limur og Anita Vibergsdóttir tiltakslimur. Soleiðis samtykt.

Sosiala nevnd:

Valbólkur A: Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen, tiltakslimur fyri Boga er Kristina Roest og Bjarni Hammer er tiltakslimur fyri Súsonnu Bertholdsen. Valbólkur B: Anita Vibergsdóttir, tiltakslimur er Alvi Mortensen. Soleiðis samtykt.

Tekniska nevnd:

Valbólkur A: Kristina Roest og Bjarni Hammer, tiltakslimur fyri Kristinu er Súsanna Bertholdsen og tiltakslimur fyri Bjarna Hammer er Bogi Johannesen. Valbólkur B: Alvi Mortensen, tiltakslimur Anita Vibergsdóttir. Soleiðis samtykt.

Bjarni Hammer frá valbólki A ynskti at fáa eina viðmerking í gerðabókina, sum er soljóðandi:



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

"Valbólkur A var vísur í, at aðrar nevndir eisini skuldu veljast á býráðsfundinum í dag. Tá aðrar nevndir ikki vóru á skrá til fundin í dag, so ynskti valbólkur A, at fáa hetta málið atkvøtt á skrá, men fekk at vita frá umsitingini, at hetta ikki lat seg gera."

Borgarstjórin ynskti, at viðmerkja soljóðandi:

"Tað hevur verið samskifti við Kommunufelagið, uttanhýsis advokat og kommunala eftirlitið um spurningin viðvíkjandi val av limum í føstu nevndir býráðsins."

Súsanna Bertholdsen frá valbólki A ynskti hesa viðmerking til gerðabókina:

"Samskifti, sum borgarsjórin hevur havt við Kommunufelagið og uttanhýsis advokat, sum valbólkur A hevur biðið um innlit í, hevur valbólkurin ikki fingið innlit í fyrrenn á býráðsfundin. Hetta heldur valbólkur A er átaluvert".

**Skjøl**

- Niðurstøðan hjá kommunala eftirlitinum
- Bræv við svarið til Kommunala Eftirlitið
- Áheitan um eyka- býráðsfund - teldubræv frá valbólkinum
- Móttøkuváttan frá kommunustjóranum
- Góðan dagin Kristin og Henrik.docx
- Áheitan frá valbólki, um at skipa býráðsnevndir av nýggjum
- Móttøkuváttan frá kommunustjóranum
- Kunning frá borgarstjóranum um viðkomandi skjøl í málinum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 2. Skattatøl í desember og restina av árinum

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri desember og restina av árinum 2017.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2016-2017.xlsx

**08.00.00-Ø54-1-11**

## 3. Dagføring av reglugerð fyri brúk av bátaplássum

### Málsfrágreiðing

2 uppskot eru gjørd viðvíkjandi dagføring av reglugerð fyri bátaplássini í Tvøroyrar kommunu, sí viðfestu uppskot. Av tí at ógreiða er um, hvat fyri uppskot til reglugerð bleiv samtykt á býráðsfundinum tann 11. desember 2017 - uppskot nr. 1, dagfest 23. oktober 2017 ella uppskot nr. 2, dagfest 4. desember 2017 - verður málið lagt fyri býráðið til nýggja støðutakan á fundinum tann 8. januar 2018.

Vísandi til samskiftið í málinum og grundgevingar í hesum sambandi, mælir kommunustjórin til, at býráðið samtykkir uppskot nr. 1.

**Vinnu- og havnanevnd, 8. november 2017, pkt. 1:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið uppskotini til dagføring av reglugerð fyri bátapláss, og tekur undir við uppskotinum frá havnarmeistaranum.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Havnameistarin skal gera smávegis tillagingar, sum verða lagdar fyri nevndina á komandi fundi.

**Vinnu- og havnanevnd, 4. december 2017, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til reglugerð frá havnarmeistaranum, móttikið 23-11-2017.

**Fíggjarnevndin, 11. december 2017, pkt. 8:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og góðkenna reglugerðina fyri bátapláss í Tvøroyrar kommunu. Málið beint í býráðið til endaliga góðkenning.

**Býráðið, 11. december 2017, pkt. 7:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini, og góðkenna reglugerðina fyri bátapláss í Tvøroyrar kommunu.

## Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at samtykkja uppskot nr. 1 til reglugerð.

## Skjøl

- Uppskot til reglugerð um bátapláss
- Kunning til teknisku deild um at viðgera reglugerð í nevndunum
- Samskifti við havnarmeistaran um reglugerðina
- Samskifti um reglugerð og oyðublað
- Kunning frá havnarmeistaranum um verandi reglugerð
- Reglugerð 2015.pdf
- Reglugerð uppskot til 2018.docx
- Móttøkuváttan frá havnarmeistaranum
- Samskifti við Jón Boga Guttesen, havnarmeistara



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**04.31.10-G01-1-17**

## 4. Uppskot at broyta byggisamtykt í Froðba fyri økið til nýggjan kirkjugarð

### Málsfrágreiðing

Uppskot um at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki "B1: Bústaðarøki" til øki "E: Almennir stovnar".

Ásetingarnar eru:

Øki E: Almennir stovnar

1) Økið verður lagt av til almennar stovnar til undirvísing, røktarheim, heilsurøkt og mentunarlig endamál o.a.t.
2) Innan fyri økini mugu bert verða gjørdir bygningar, sum samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hevur samband við teir.
3) Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.
4) Bygningar kunnu bert verða bygdir eftir byggiætlan, sum býráðið hevur góðkent fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

**Tekniska nevnd, 29. januar 2018, pkt. 2:**
Nevndin mælir til, at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

Samstundis verða ásetingarnir fyri øki E broytar til eisini at umfata kirkjugarðar.

Matr. nr. 23m í Froðba verður broytt frá øki B1 (bústaðarøki) til C (Vinnuøki).

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at broyta byggisamtyktina fyri Froðba - í sambandi við ger av kirkjugarði - sambært tilmæli frá teknisku nevnd, at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

### Skjøl



Formansváttan

- Matr nr. 23c Froðba
- 29.10.2018 Nýggjur Kirkjugarður Støðumynd2.pdf
- 24.10.2017 Nýggjur Kirkjugarður Støðumynd1.pdf

**82.00.00-P20-1-13**

## 5. Uppskot um bygging av tilbúgvingarstøð (Brandstøð)

### Málsfrágreiðing

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 4. oktober 2016, pkt. 2:**
Oddur Dimon, tilbúgvingarleiðari, nevnir at hølisviðurskiftini á verandi brandstøð ikki eru hóskandi.

Málið verður tikið við í viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2017.

**Tekniska nevnd, 29. januar 2018, pkt. 15:**

Býarverkfrøðingurin kunnaði um eitt uppskot til brandstøð.
Málið verður lagt fyri býráðið til víðari viðgerð.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina um nýggja tilbúgvingarstøð til eftirtektar.

### Skjøl

- tilbúgvingarstøðin 27-01-2018.pdf

**00.01.10-I00-20-17**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 6. Fyrispurningur um keyp av Roykstovuni

**Málsfrágreiðing**

Anna Kirstin Thomsen spyr í teldubrævi, um Tvøroyrar kommuna hevur áhuga í at keypa søguligu sethúsini Roykstovan eisini nevnd faktorhúsini frá 1836, ið eru elstu hús á Tvøroyri, sí viðfestu skjøl við samskifti í málinum.

Býráðið saman við teknisku deild var og hugdi eftir roykstovuni 5. oktober 2017. Húsini eru í ringum standi. Økið er 1370 m2 stórt.

Sambært samtykt hjá Tvøroyrar býráð, bleiv boð uppá Roykstovuna áljóðandi kr. 400.000,- sent til advokatin hjá Annu Kirstin Thomsen, Fríðu Patursson, tann 31. oktober 2017. Av tí at einki frættist aftur frá advokatinum, bleiv ein uppfylgjandi fyrispurningur sendur 17. november 2017. Tá heldur einki aftursvar kom frá advokatinum tá, ringdi kommunustjórin til advokatin fríggjadagin 22. desember 2017. Telefoniskt, upplýsti Fríða Patursson, advokatur, at hon hevði móttikið boðið uppá Roykstovuna frá Tvøroyrar kommunu, men at eigarin - Anna Kirstin Thomsen - ynskti ein hægri prís fyri húsini, sum er eitt stað millum kr. 400.000,- og kr. 700.000,-

Fríða Patursson upplýsti, at Skiftirætturin nú rykti eftir at fáa málið avgreitt, og tí bað undirritaði um, at Fríða Patursson sendi Tvøroyrar kommunu eina skrivliga kunning um niðurstøðu teirra viðvíkjandi boðnum á kr. 400.000,- frá Tvøroyrar kommunu áðrenn býráðsfundin 29. desember 2017.

Fríða Patursson, advokatur, vendi aftur til Tvøroyrar kommunu við teldubrævi tann 4. januar 2018, sí viðfesta teldubræv frá advokatinum og svarið frá kommunustjóranum í hesum sambandi.

**Býráðið, 11. september 2017, pkt. 1:**
Býráðið uttan Kristina Roest samtykti, at gerast skal ein teknisk meting av Roykstovuni. Í tí sambandi kontaktar kommunustjórin Onnu Kirstin Thomsen soleiðis at avtala verður ein skoðan av roykstovni, har tekniska deild luttekur saman við býráðslimum.

**Býráðið, 9. oktober 2017, pkt. 10:**
Alvi Mortensen, formaður í teknisku nevnd, mælir til, at fara í samskifti við Fríðu Patursson, advokat, við tí í hyggju, at Tvøroyrar kommuna leggur eitt boð inn á roykstovuna/faktorhúsini.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Boðið skal vera áljóðandi tað skuld, ið eigararnir hava upplýst fyri kommununi, t.e. áleið kr. 400.000,-

6. býráðslimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen tóku undir við tilmælinum frá Alva Mortensen.

1. býráðslimur, Kristina Roest, tók ikki undir við tilmælinum hjá Alva Mortensen.

Tilmæli hjá Alva Mortensen tiskil samtykt av býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 29. desember 2017, pkt. 2:**
Fíggjarnevndin tók kunningina til eftirtektar og beinir málið til kunning í býráðnum.

**Býráðið, 29. december 2017, pkt. 3:**
Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og samtykti, at rykkja Fríðu Patursson, advokat, og Onnu Kirstin Thomsen eftir einum skrivligum svari uppá boðið á kr. 400.000,- sum Tværoyrar kommuna setti fram um Roykstovuna tann 31. oktober 2017.

**Avgerð**

Býráðið bleiv kunnað og samtykti, at beina málið til viðgerð í teknisku nevnd, sum skal koma við tilmæli um eitt nýtt boð uppá Roykstovuna.

Býráðið ynskti, at Anna Kirstin Thomsen bleiv kunna hesum viðvíkjandi.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:15**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2018 |
| Fundardagur | 31. januar 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan